# Hondbólturin verður broyttur

**HONDBÓLTUR** Á limafundi í Hondbóltssambandinum í morgin skulu feløgini taka støðu til tilmæli og uppskot frá arbeiðsbólkinum, sum hevur endurskoðað hondbóltin í ein mánað



**BÓLKURIN**

*Arbeiðsbólkurin á sínum fyrsta fundi. Frá vinstru: Anna Rein, skrivari, Jústines Justinussen, Hallur Danielsen, Ingi Olsen, formaður, og Jógvan Martin Mørk. Á myndini vantar Agnas Tausen*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Hilmar Jan Hansen

Síðani limafundin hjá hondbóltsfeløgunum fyri einum mánaði síðani hevur ein arbeiðsbólkur gjøgnumgingið hondbóltskappingina í breiðastu merking. Og á nýggjum limafundi í Hondbóltssambandinum í morgin klokkan 10 skulu feløgini taka endaliga støðu til, hvussu tað heila skal skipast.

Fyrst og fremst var tað ynskið um at víðka bæði Sunset- og Atlantic Airways-kappingina, sum setti gongd á hetta arbeiðið. Feløgini góvu á fyrsta fundinum til kennar, at tey fegin vilja víðkað tær báðar bestu deildirnar.

Tað vil siga, at einki lið flytur niður úr Sunset-kappingini, men at bæði Kyndil og Sóljan kunnu flyta upp, so hon kann gerast átta lið. Og somuleiðis flytur einki lið niður úr Atlantic Airways-kappingini, men Team Klaksvík flytur upp, so hon telur sjey lið næsta kappingarár.

Sosialurin hevur sæð okkurt av tilfarinum, arbeiðsbólkurin hevur sent feløgunum, og á limafundinum í morgin fer bólkurin at mæla feløgunum til at endurskoða broytingarnar innan fimm ár, men í fyrsta lagi um tvey ár. Hetta, so tað ymsa skal sleppa at standa sínar roynd, áðrenn tað verður broytt aftur.

## Best við seks liðum

Hóast tað hevur ligið í kortunum, at liðini í teimum báðum bestu mans- og kvinnudeildini verða ávikavist sjey og átta lið næsta kappingarár, mælir arbeiðsbólkurin til, at tær báðar bestu deildirnar koyra eftir sama leisti.

Sum skilst, heldur arbeiðsbólkurin, at best hóskandi tal á liðum í teimum báðum deildunum er seks lið, men at so leingi sum bara sjey ella átta feløg kunnu bjóða av, eiga sjeynda og áttanda felagið at fáa part í bestu deildunum.

Men so skjótt sum tað innan fyri næstu fimm árini eru nóg nógv feløg – og her verður nevnt talið níggju – ið kunnu gera seg galdandi í bestu deildunum, eigur at verða farið aftur til seks lið, tí tá ber til at hava eina áhugaverda, góða og sterka kapping í 1. deild.

Sum nakað nýtt, mælir Arbeiðsbólkurin til, at 1. deild kemur at eita Menningardeildin. Hetta er ásannandi tann veruleika, at næstbesta deildin meira er ein menningardeild hjá Sunset- og Atlantic Airways-feløgunum, so leingi sum liðsamansetningin fevnir um næstbestu manningarnar hjá hesum feløgum.

Lagt verður upp til, at Menningardeildin onkursvegna verður ein spegilsmynd av bestu deildunum, so somu feløg eru umboðað í báðum, tí á tann hátt heldur arbeiðsbólkurin, at øll feløgini fáa somu møguleikar at menna sínar spælarar, ið ikki eru við í bestu deildunum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Fakta

Á limafundi í Hondbóltssambandinum tann 20. mars var ein arbeiðsbólkur settur at endurskoða verandi kappingarleist hjá hondbóltinum og koma við møguligum uppskotum til framtíðarleist. Arbeiðsbólkin manna Ingi Olsen, formaður, Jógvan Martin Mørk, Jústines Justinussen, Hallur Danielsen, Agnas Tausen og Anna Rein, skrivari. Bólkurin hevur havt fleiri fundir, sent feløgunum hoyringsskriv, havt Dómarafelagið við á fundi, umframt at bæði uppskot og tilmæli hava úti hjá feløgunum, so tey kunnu koma við sínum endaligu viðmerking. Nú er hetta arbeiði komið so mikið langt, at arbeiðsbólkurin á limafundi í Hondbóltssambandinum í morgin fer at koma við tilmæli um nýggjan kappingarleist, sum feløgini so skulu taka støðu til.

## Ongar steypareglur

Millum tingini, arbeiðsbólkurin eftirlýsir, er ein reglugerð fyri steypakappingar. Sum er, eru hvørki reglugerðir fyri Coca-Cola kappingarnar ella nakrar av hinum steypakappingunum, og tí mælir arbeiðsbólkurin til, at slíkar reglur verða gjørdar sum skjótast.

Eisini mælir bólkurin til, at landsliðsarbeiðið við bæði A- og U-landsliðum verður skipað fyri í minsta lagi næstu fimm árini, har atlit skulu takast at bæði tí ítróttarliga og tí fíggjarliga.

Eitt annað hugskot, sum verður lagt fram, er ein HSF-álmanakki á HSF-heimasíðuni, har tað skal bera til at síggja, hvørji vikuskifti eru sett av til landsliðsarbeiði, nær kappingin byrjar, nær steypakappingar liggja, nær altjóða dystir eru, nær dómara- og venjaraskeið eru, umframt annað, sum hevur týdning fyri hondbóltin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*